# TILTØK

**Gudstænasta**
*hóskvøldið 10. nov.*
Norðoya Vistarheim kl. 19.30, Niels Pauli Danielsen

**Gudstænastur**
*25. sunnudag eftir trinitatis*
Gjógv kl. 12.00 messa, Emil Olsen
Norðskála kl. 15.00 barnagudstænasta, Emil Olsen
Oyndarfjørður kl. 12.00, Jógvan Fríðriksson, altargongd
Fríðrikskirkjan kl. 11.00, Martin R. Jacobsen, altarg.
Søldarfjørður kl. 11.00, Meinhard Bjartalíð, altargongd
Miðvágur kl. 12.00, David Johannesen
Sørvágur kl. 12.00, Inga Poulsen Dam
Klaksvíkar Sjúkrahús kl. 10.00, Øssur Kjølbro
Norðoya Røktarheim kl. 14.30, Øssur Kjølbro
Christianskirkjan kl. 11.00, Niels Pauli Danielsen
Vesturkirkjan kl. 11.00: Bergur D. Joensen
Hests kirkja kl. 12.00, Heri Joensen
Vestmanna kirkja kl. 12.00, Marjun Bæk
Hvannasunds kirkja kl. 12.00, Elsa Funding
Havnar kirkja kl. 11.00, Sonja Klein
Hvítanes kl. 11.00, Bjarni Bæk
Øravík kl. 11.00, Jónsvein Bech
Sandur kl. 12.00, Jákup R. Hansen

**Hebron á Argjum**
Sunnudagin kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30: Samvera við drekkamunni. Kl. 12.00: Sunnudagsskúli og kl. 12.00 verður eisini møti. Virgar Hvidbro talar.

**Adventkirkjan**
Hóskvøldið 10. nov. kl. 19.30 bønarmøti hjá Harri og Sunnevu Guðmundsson, Niðaragøta 3, Hoyvík.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti, Beinta Áargarð talar um evnið "Eyðkenni í lívi hins trúgvandi – lýdni". Kl.11.30 samvera við drekka. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 heldur Jógvan Z. fram við røðini: Sannleikar úr Rómbrævinum "Øll hava syndað" (3:9-20, 23).
Barnaansing er undir møtinum.
Sunnudagsskúlin kl. 12.
Møti kann hoyrast á netinum www.livdin.fo
Sunnukvøldið kl. 20 verður tiltakið" Tú hevur virði stórt" á Tjóðpalli Føroya. Atgongumerkir fáast í Kunningarstovuni í Tórshavn.

**Adventkirkjan**
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarmøti hjá Torill og Bergi Jensen, Vípuvegur 12.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 06.00 morgunbøn, kl. 16.00 bøn fyri samkomuni, kl. 19.00 Chil.
Í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20.00 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17.00 landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 sunnudagsskúlin.
Mánadagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20.00 bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting. Barnaansing verður eisini.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl 20.00 Bønar/ uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hoskvøldið kl. 20.00: Møti.
Sunnudagin sunnudagsskúli kl. 14.00 í Býlingshúsinum á Norðrasta Horni.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Hera Joensen.

**Evangeliihúsið**
*Tróndargøta*
Hósdagin kl. 16 eldrahugni.
Hóskvøldið, fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 møti við Viggo Wilhelmsen.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl 18 evangeliskt møti, Viggo Wilhelmsen talar á báðum møtunum. Týskvøldið kl. 20 bønarmøti.
/www.gospel.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Hóskvøldi kl 20.00
Ungdómsmøti: v/Rúna Rasmussen, fríggjakvøldi kl 20.00 After Eight, sunnudagin, kl 14.00 sunnudagsskúli kl 18.00
Møti v/ Sunnivu Poulsen, mánadagin kl 15.30 –16.30 venur barnakórið kl. 20.00 bønmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15.00: Bønarmøti. Kl. 19.00: Menninir savnast.
Hóskvøldið kl. 20.00: Heimaforbund fyri allar kvinnur.
Fríggjakvøldið kl. 20.30: Tey ungu møtast í fimleikarhøllini.
Sunnudagin kl. 11.00: Møti.
Kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Kl. 17.30: Bøn, og kl. 18.00: Møti. Øll eru vælkomin.
www.frelsunarherurin.fo

**Meinigheitshúsið**
Mikukvøldið kl. 19.00 Meinigheitskórið venur.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/Sólrun og Per Poulsen - missiónsmøti úr Kina.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hóskvøldið 10. nov. kl. 19.00 í KFUK: Basarur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Hóskvøldið kl. 19.00: Barnaarbeiði.
*Onki* møti sunnukvøldið kl. 18.00.

**Miðvágs Missiónshús**
Missiónsvikan heldur fram hóskvøldið kl: 20:00 v/ Regin Høgnesen trúboðara úr Leirvík og Manskórinum í Vágum.
Fríggjakvøldið kl. 19:30 talar Ólavur Magnussen av Nesi og Meinigheitskórið úr Havn syngur. Fríggjakvøldið kl. 22:30 verður kafé-kvøld í Bygdarhúsinum.
Leygarkvøldið kl. 19:30 talar Marjan Nielsen av Nesi og Marjun, Kristina og Katrin úr Havn syngja. Innsavnan til Húsið. Leygarkvøldið kl. 22:30 ungdómsløta.
Fríggjakvøldið og leygarkvøldið verður barnaansing fyri smærri børn og drekka aftaná møtini.
Hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia Vágar,**
*Miðvágur*
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Ludvig Jacobsen talar.
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Vegna missiónsviku í Tjørnuvík verður onki møti í Hvalvík sunnukvøldið.
Koyrt verður frá missiónshúsinum í Hvalvík hálvan tíma áðrenn møtið sunnukvøldið í Tjørnuvík.
Sunnudagsskúli verður sum vanligt kl. 14.30 í Hvalvík.

**Bygdarhúsið í Tjørnuvík**
***Missiónsvikan byrjar hóskvøldið***
Hóskvøldið kl. 19.00: Luttøka við fólki úr Tjørnuvík.
Fríggjakvøldið kl. 19.00: Sigfred Johannesen talar. Petur Hans og Thomas Dam syngja.
Leygarkvøldið kl. 19.00: Leo Hans Mikkelsen talar. Streingjakórið úr Vágum syngur.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Alfred Olsen talar. Streingjakórið av Toftum syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Karmel, Eiði**
Møti sunnukvøldið kl. 19.00 við Justinus Poulsen.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sudanringurin kemur saman týskvøldið 15. nov. kl. 19.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Hósdagin kl. 17,30: Liljur
Sunnudagin kl. 10,30: Møti v/ Símun Jacobsen

**Missiónsvikan í Oyndarfirði**
heldur fram.
Hóskvøldið kl. 20.00 talar Frants Jensen. Luttøka úr Fuglafirði.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 talar Árni Jacobsen. Húsakórið í Leirvík syngur.
Leygarkvøldið kl. 20.00 luttøka úr Heiðunum, Glyvra Streingjakór syngur.
Sunnudagin kl. 12.00 gudstænasta við altargongd við Jógvan Fríðrikssyni. Sunnudagsskúli kl. 14.30. Møti kl. 18.00 við Niels J. Nielsen, trúboðara. Tofta Streingjakór syngur
Leygarkvøldið innsavnan til Húsið.
Sunnukvøldið innsavnan til Heimamissiónina.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Møtir í Bygdarhúsinum á Strondum**
Leygarkvøldið 12. nov. kl. 20.00 verður sangmøti við felagssangi og ýmisk luttaka við sangi og vitnisburði, so sum Julius, Luddi, Herman, Gigga, Tórmund og Jonna.
Talarar Palli Højgaard og David Bech.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Evangeliskt møti. Tórmund og fleiri luttaka.
Kaffi verður aftaná.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 verður ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 14:30 er sunnudagsskúli. Barnakórið venur aftaná. Kl. 18 er møti v/ Sverra Steinhólm.
Evni er "Granska - fylgja - læra. Um prestin Ezra.

**Missiónshúsið í Leirvík**
*Sunnudagin 13. nov.:*
Sunnudagsskúli kl 14.30.
Møti kl 18 v/Una Næs, evni "Hjúnalagið" og ungdómsmøti kl 21 v/ Vagn Foldbo.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Mikukvøldið kl. 20: Leiðaraundirvísing við Maibritt Frederiksen. Øll vælkomin.
Leygarkvøldið kl. 21.00: Awake við vitnisburðum og dramaframførslu.
Sunnudagin kl. 17.00: Møti við Malmberg Olsen. Sangur við Eyðun Jacobsen og døtrum. Barnamøti kl. 17.00.
Vælkomin í Kelduna!
www.keldan.fo

**Bønhúsið í Søldarfirði**
Missiónsvika
Hóskvøldið kl. 20.00 talar Øssur Kjølbro, Glyvra streingjakór syngur.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 talar Dánjal Andreassen, Gøtukórið syngur.
Leygardagin kl. 16.00 barnamøti við Johild Finnsson.
Hjartaliga vælkomin á møti.

**Berøa, Saltangará**
Fríggjakvøldið er ungdómsmøti kl. 21.00.
Sunnudagin kl. 11.30 breyðbróting og sunnudagsskúli, kl. 18 møti.

**Kallsoy**
Møti verður í kirkjuni í Mikladali leygarkvøldið kl.20.00 og í kirkjuni á Húsum sunnudagin kl.16.00 við Jonnu Johannessen og fleiri.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl 20.00 ungdómsmøti. Ung úr missiónshúsinum á Glyvrum luttaka.
Sunnudagin kl 14.00 sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl 18.00 møti v/ Tummas Juul Askham og Olvheðin Jacobsen.
Mánakvøld kl 20.00 bønarmøti.

**Norðoya vistarheim**
Elsa Funding hevur andakt á Norðoya vistarheimi í Klakksvík hóskvøldið hin 10. november kl. 19.30.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Mikukvøldið kl.20.00: bíbiltími við Øssur Kjølbro 1. kor kap 11. Hóskvøldið kl.19.00 bønarløta. Hóskvøldið kl. 20.00 venur gospelkórið Gleðið.Fríggjakvøldið kl.22.00 opið hús.
Sunnudagin kl.14.00 sunnudagsskúli. Kl.17.30 bønarløta.
Kl 18.00 familjumøti.
Kl.21.00 ungdómsmøtið. Øll eru vælkomin.
www.kuff.fo

**Aglow Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar. Mánadag kl 16.00 samlast ungar gentur frá 11 ár og uppeftir á Soli Deo Gloria.
Tú ert vælkomin!

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl.20.00 er bønarmøti
Evangeliskt Vikuskifti:
Fríggjakvøldið kl.20.30 er ungdómsmøti við André Matras & Andreas Nýggjagarð
Leygarmorgun kl.10.00 er bøn og kl.20.30 er ungdómsmøti við Sannu Hammer og team
Sunnudagin kl.14.00 er sunnudagsskúli og kl.18.00 er møti við Sannu Hammer og team
Mánadag til fríggjadag kl.6.15 er morgunbøn
Tú ert hjartaliga vælkomin!

**Missiónshúsið í Skálavík**
Missiónsvikan verður frá 17. til 20. nov. Fremmandir talarar. Ymiskar sangkreftir. Hjartaliga vælkomin.
*Stýrið*

**Betania, Skopun**
Morgunmøti kl. 11.00, Frítór Debes talar. Kvøldmøti kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími. 2. Kor. 6. kap.
Hóskvøldið kl. 20.00 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Minnist til jólapakkarnar. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Onki møti verður sunnukvøldi 13. nov. vegna møti á Tvøroyri.
*Stýrið*

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Í sambandi við at missiónshúsið er 75 ár verður hetta hátíðarhildið við møti sunnukvøldið kl. 18.
Hilmar Bech leggur fyri og streingakórið í Porkeri fer at syngja og boðið verður til nátturða. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Salem, Tvøroyri**
Fundarrøð heldur fram í kvøld kl. 20.00. Páll á Lakjuni, Jógvan Páll Sevdal og Svenning av Lofti tala.
Evni: »Krossurin og ávirkan hansara á nútíðarsamfelagið«.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Týskvøldið 8. nov. kl. 18.00: Junior-klubbur!
Mikukvøldið 9. nov. kl. 18.00: Junior-møti. Kl. 20.00: Heimaforbundið.
Hóskvøldið 10. nov. kl. 20.00: Á ferð í bíbliuni v/ Eddie Bech!

**Vágs kirkja**
Allahalganna konsertin hjá Kirkjukórinum Ljómi verður sunnudagin tann 31. nov. kl. 18.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 morgunmøti og kl. 18.00 evangeliskur fundur.
Mánakvøldið kl. 20.00 bíbliutími og bøn.

**Felagið Tórshavn GONGUTÚRUR**
Sunnudagin 13. november verður gongutúrur: Farið verður niðan á Stiðjafjall. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Túrurin er lættur til miðal tungur. Gingið verður uml. 2 tímar, minst til at hava góð og heit gongklæðir og ein matpakka við.
Tilmelding neyðug.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Hósdagin 10. november***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45 Enskt á byrjanarstigi 2, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00-17.00 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 11. november***
kl. 10.00-13.30 Matgerð – Anne Grete Harlou
kl. 12.00 Døgurði.
kl. 10.00-12.00 Tekning og máling. Vegleiðing er á staðnum.
kl. 13.00-17.00 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
*er opið frá kl. 15 til 18.*
Týsdag kortspøl og stokkar.
Mikudag silvurarbeiði og annað handaligt.
Hósdag fimleikur, kortspøl og stokkar.
Allar dagar drekkamuður við nýbakaðum.

**Tilhaldin Hugnin í Sandoynni**
Er opið mánadag og mikudag kl. 14.00 til 17.00. Drekkamunur er at fáa báðar dagarnar eins og bløðini eru til taks. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
***Hósdagin 10. november***
Myndaskering v/ Hjalmar Olsen
***Fríggjadagin 11. november***
Byrjandi enskt v/ Annette Gaardlykke.

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Eldrafelagið Kumlá**
Vit hittast við felagshúsini týskvøldið 8. november kl. 19.00 og fara at vitja Eldrafelagið Nón.